Skrivari til Kommunusamskipan Føroya

Kommunusamskipan Føroya (KSF) hevur tikið avgerð um at seta eina skrivstovu á stovn, sum skal taka sær av felags áhugamálunum hjá limakommununum. Skrivstovan er í Havn.

Lýsing av Kommunusamskipanini
Kommunusamskipan Føroya er ein tvørkommunalur felagsskapur, har seks tær størstu kommunurnar í Føroyum eru limir, t.e. Klaksvík, Fuglafjørður, Runavík, Tórshavn, Tvøroyri og Vágur. Av serligum áhugamálum í løtuni eru býti av uppgávunum millum land og kommunur, uppskot til umsitingarliga mannagongdir o.a.

Kommunusamskipanin bjóðar
- eitt starv við nógvum spennandi uppgávum. M.a. kann nevnast at tú:
- verður bindiliðið millum limakommunurnar
- skal samskipa virksemið hjá limakommununum
- kemur at luttaka í og skipa fyri aktivitetum hjá limakommununum
- kemur at gera kunningartilfar og rapportir til limakommunurnar
- verður ráðgevi hjá kommununum, bæði hvør sær og í KSF høpi
- verður protokolførari hjá KSF og skal ansa eftir, at samtyktirnar vera fylgdar
- kemur at samskifta við landsumsitingina, áhugabólkar og aðrar interessentar hjá kommununum

Kommunusamskipanin roknar við at tú m.a.
- hevur umsitingarligar royndir og ynskiligt er at viðkomandi hevur
- relevanta útbúgving
- hevur áhuga í kommunalum viðurskiftum
- hevur hug at fyrisita og samskifta, bæði í skrift og talu
- er málsøkjandi og hevur hegni til at samstarva við politisku skipanirna

Setunarviðurskifti
Starvið verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Meira fæst at vita
um starvið við at venda sær til formann felagsins, Jógvan Krosslá, tlf. 373024, ella Jens Marius Poulsen, tlf. 310185.

Umsókn
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skal vera KSF í hendi í seinasta lagi 6. august 2001. Umsóknin skal sendast til

Kommunusamskipan Føroya
att. Jógvan Krosslá, borgarstjóri
c/o Vágs Kommuna
900 Vágur

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Varaleiðari og pedagogur

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir varaleiðara og pedagogi til útibarnagarðin í Gundadali.

Størvini
Talan er um 1 varaleiðarastarv og 1 pedagogstarv, 30 tímar um vikuna, ávikavist 40 tímar og 30 tímar.

Stovnslýsing
Á stovninum ganga 16 børn í aldrinum 5 til 7 ár.

Vit bjóða
tvey áhugaverd størv, í einum grannalagi har ítróttur og náttúran hava stóran týdning í dagliga arbeiðinum.

Varaleiðarin verður partur av einum virknum leiðara toymi.

Vit ynskja
at umsøkjarin:
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrum og starvsfeløgunum
- kann arbeiða sjálvstøðugt, og taka avgerðir
- saman við starvsfólkunum er við til at menna tað pedagogiska arbeiðið
- dámar at vera úti saman við børnunum

Setanarviðurskifti
Størvini verða sett í august ella nærri eftir avtalu. Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri.

Meira fæst at vita
um størvini við at venda sær til Astu Hjelm, leiðara, tlf. 22 37 76, ella Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

Umsókn
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Miðstovninum í Gundadali, Gundadalsvegur 4, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 27. juli 2001.

SNARSKIVAN

Morgunmatur á Café Natúr
mánad.- leygard. kl. 09.00 til 11.00
NÝTT NÝTT NÝTT
CAFÉ NATÚR

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Lýsing

Álagt verður øllum djóra- og flogfenaðeigarum at taka upp alt taðfall, sum kemur frá djórum/fenaði á almennari jørð, t.e. á gøtum, breytum ella økjum, sum eru opin fyri vanligari ferðslu í Tórshavnar kommunu.

Tórshavnar kommuna

Havnin skal skína

SNARSKIVAN

Hús í Leirvík til sølu

3 hæddir (kjallari, miðhædd og loft), tilsamans uml. 135 fermetrar, alt innrættað.

Grundøkið er 430 fermetrar.
Loft: 2 kømur og eitt útloft (sjónvarpsrúm/spælirúm).
Miðhædd: køkur, stova, baðirúm, gongd, durur og eitt goymslurúm.
Byggiár: 1927.
Húsini eru høvuðsumvæld í 90-unum (loft nýinnrættað, tak skift osfr.)

Húsini kunnu síggjast eftir avtalu.

Áhugað kunnu ringja

tlf. 443 270 eftir kl. 17.00 ella á **225 117**

Summarfrí

Vegna summarfrí er skrivstovan hjá Barsilsskipanini stongd frá 23. juli til 10. august.

Telefonavgreiðslan er tó opin mánadag til fríggjadag kl. 10.00–12.00. Eisini er møguligt at seta seg í samband við Barsilsskipanina um telefax ella teldupost.

Barsilsskipanin
Postsmoga 3025 • 110 Tórshavn
Tel 35 35 55 • Fax 35 35 56 • barsil@barsil.fo

Uppsetan og skipan av barrum
Til:
Brúdleyp
Rundar føðingardagar
Starvsfólkaveitslur
Ársveitslur
Reseptiónir
og tilikt

Hans á Lag Sp/f
Tlf. 21 93 83
hanslag@post.olivant.fo
Sosialurin 311820

Summarfrí

23. juli - 10. august

Vegna summarfrí er avgreiðslan stongd frá mánadegnum 23. juli til fríggjadagin 10. august, báðir dagar íroknaðir.

Telefonavgreiðslan er tó opin mánadag til fríggjadag kl. 10.00 - 12.00. Eisini er møguligt at seta seg í samband við ALS um telefax ella teldupost.

Útgjaldið av arbeiðsloysisstuðli fyri skeið 14 og 15 og postur annars verða avgreidd.

ALS
Arbeiðsloysisskipanin
P.O.Box 3022 • FO-110 Tórshavn
Tel 349550 • Fax 349551 • teldupostur: als@als.fo

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

Tvøroyrar Kommuna

Við hesum verður starv sum verkfrøðingur lýst leyst at søkja.

Høvuðsverkevni:
- Leiðsla á Teknisku Deild.
- Projekteringsarbeiði og eftirlit.
- Uppmátingar-, kortleggingar- og skrásetingararbeiði.
- Býar- og byggiplanlegging.
- Málsviðger og ráleggingararbeiði.
- Stýring av kommunalum viðlíkahaldsarbeiði.
- Luttøku í dagligum umsitingarligum uppgávum v.m.

Førleikakrøv:
- Verkfrøðingur ella onnur viðkomandi. útbúgving.
- Royndir í omanfyri nevndu arbeiðsøkjum.
- Førleiki í projekteringsarbeiði og byggilist.
- Munnligan og skrivligan málførleika (eisini í enskum).
- Hollan telduførleika.
- Opin og fyrikomandi.

Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi starvinum fáast við at venda sær til býráðsskrivstovuna á telefon 371085.

Starvið verður at seta sum skjótast.

Skrivlig umsókn, saman við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skal vera býráðnum í hendi í seinasta lagi 01.08.2001.

KIA
CARNIVAL
2.9 Dohc Turbo-Diesel
16 V, 126 HK, 5 hurðar
Sosialurin 311820

Rætti bilurin til mong endamál.
Pláss fyri 7 fólkum
og hópin av viðføri.
D. B. Bilar
Tel. 310 600

Motorpassara-útbúgving

Treytað av nóg stórari luttøku byrjar undirvísingin 6. august 2001.

Umsøkjarar við viðkomandi yrkisútbúgving kunnu byrja seinni, 3. september.

Skeiðið er liðugt 21. desember 2001.

Treytirnar fyri upptøku eru:
- at ein hevur fylt 18 ár og annahvørt
- hevur staðið yrkisskeið á góðkendum sjóvinnuskúla ella
- hevur havt maskintænastu við fiski- ella farmaskipi á 20 tons ella meira í 12 mánaðir.

Meiri fæst at vita um m.a. innivist og stuðulsmøguleikar á telefon nr. 456311.

Skrivlig umsókn skal sendast Tekniska Skúla í Klaksvík, Postboks 20, 700 Klaksvík í seinasta lagi 20. juli 2001.

Tekniski Skúlin í Klaksvík
Telefon nr. 45 63 11 Telefax nr. 45 73 11

Stjóri til fiskavirki

Søkt verður eftir stjóra til fiskavirkið P/f. Vaðhorn Seafood á Strondum.

Tað er ein fyrimunur, at umsøkjarar hava leiðsluroyndir og holla vitan um fiskaframleiðslu.

Fyri tann rætta persónin kunnu vit bjóða eitt áhugavert og avbjóðandi starv, har tú, saman við dugnaligum starvsfólkum kanst vera við til at menna eitt gott arbeiðspláss.

Vit vænta at tú:

- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- hevur góð samstarvsevnir
- hevur áhuga í at skapa úrslit

Løn verður ásett eftir nærri avtalu.

Umsóknir skulu sendast til Sp/f Grannskoðarstovan á Skála, áðrenn 16. juli 2001, har eisini meir fæst at vita um starvið.

Sp/f Grannskoðarstovan á Skála
Eyðbjørg Thorleifsson · Páll Højgaard
Civiløkonomar og skrásettir grannskoðarar FRR
Tlf. 441666 · 480 Skála

Til leigu

Hervið verður matstovan í Bygdarhúsinum á Strondum lýst til leigu.

Áhugað kunnu venda sær til Sjóvar Kommunu. Kommunuskrivstovan er opin hvønn dag frá kl. 8.30–12.00.

Sjóvar Kommuna
490 Strendur

Avgreiðslutíðir á Almannastovuni

Í vikunum 30 og 31 – t.v.s. frá 24/07 til og við 3/08-2001 eru allar deildir hjá Almannastovuni og Hjálpartólamiðstøðin stongdar.

Tó kann bráðfeingishjálp fáast um telefonina hvønn gerandisdag uttan mikudag millum kl. 10.00 og 12.00.

Frá mánadegnum 6. august 2001 eru Almannastovan, allar deildirnar og Hjálpartólamiðstøðin opnar aftur sum vanligt.

Almannastovan og Hjálpartólamiðstøðin

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo